Í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein



# Sukursjúkan hóttir

Danska Diabetisfelagið roknar við, at í 2025 hevur ein hálv millión danir sukursjúku. Tað er tvífalt so nógv sum í dag. Um fyribyrgjandi tiltøk verða sett í verk beinanvegin, ber til at forða fyri stóra vøkstrinum, men verður einki gjørt, er tað meira sannlíkt, at 600.000 fólk hava sukursjúku um góð 20 ár.

- Talið á teimum, sum hava diabetis, veksur í stórum, og gera vit einki við gongdina, so svíkja vit túsundtals danir, sigur professarin Allan Flyvbjerg, sum er formaður fyri danska Diabetisfelagið, við Politiken.

# Boys In A Band á Spot



Nógvir føroyskir bólkar og tónleikarar hava spælt til árliga Spot Festivalin í Danmark, sum er eitt tiltak fyri bólkar, ið eru á veg fram. Nú kunnger festivalurin, at føroysku Boys In A Band skulu spæla á festivalinum í ár. Spot Festivalurin verður hildin í Århus í døgunum frá 5. til 7. juni.

# Liðug sum húsmóðir



Nicolette Sheriadan gevst nú í sínum leikluti í sjónvarpsrøðini Desperatar Húsmøður, sum eisini hevur verið sýnd í føroyskum sjónvarpi. Enn er ikki greitt, um hon hevur fingið sekkin, ella um hon er givin sjálv. Søgur hava gingið um, at Nicolette fór at fáa sekkin, og nú er í øllum førum greitt, at hon gevst í sjónvarpsrøðini.

# Lizzie er drúgv



Føroyska songkvinnan Lizzie hevur nú heilar 21 vikur verið á listanum yvir sangirnar, sum eru mest spældir á donskum útvarpsstøðum. Tað er sangurin Ramt I Natten, sum hevur verið eitt tað størsta hittið í Danmark í ár. Í nógvar vikur var sangurin mest spældi sangurin í donskum útvarpi, og framvegis er sangurin nógv at hoyra, tí sangurin liggur hesa vikuna sum nummar 7 á airplay-listanum. Eingin annar sangur á listanum hevur verið so leingi á listanum, sum sangurin hjá Lizzie.

# Teitur í Bretlandi og USA



Føroyski sangarin Teitur Lassen er í hesum døgum á konsertferð í Bretlandi. Teitur spælir nógvar konsertir í stóru bretsku býunum næstu tvær vikurnar – hann verður millum annað at hoyra í London, Sheffield, Grimsby og Glasgow. Eftir tað leggur Teitur leiðina tvørtur um Atlantshavið til USA, har hann fer at so skal á konsertferð fram til endan av mai mánaði.

Sosialurin